## Fólkaflokkurin liðugur við uppstillingina í Suðurstreymi

**Finnbogi Arge og Katrin D. Johansen, sum ávikavist vóru nummar 3 og 4 á listanum hjá Fólkaflokkin seinast, stilla ikki upp hesaferð**

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Havnar Framburðsfelag, sum er valfelag Fólkafloksins í Suðurstreymi, hevði síðsta uppstillingarfund sín í Pálsstovu í mánakvøldið, har listin til løgtingsvalið varð gjørdur liðugur.

Seinast fekk Óli Breckmann flestar atkvøður á fólkaflokslistanum, hann fekk 632 atkvøður. Næstur honum var Bjarni Djurholm, sum fekk 585 atkvøður. Síðani kom Finnbogi Arge á triðja plássi við 185 atkvøðum og Katrin D. Johansen á fjórða plássi við 109 atkvøður. Tey bæði eru ikki á listanum hesaferð.

Óli Breckmann hevur verið løgtingsmaður síðani 1974, og Bjarni Djurholm hevur verið løgtingsmaður síðani 1994. Hann hevði tó sæti á tingi fyri Jógvan Sundstein, tá hann var landsstýrismaður frá januar 1991 til mars 1993.

Av býráðspolitikarunum hjá Fólkaflokkinum í Havn stillar bara Bjarti Mohr upp, og Poul Michelsen, fyrrverandi borgarstjóri og løgtingsmaður, ætlar sær eitt come-back í politikki. Hann varð valdur á ting í 1988, men stillaði ikki uppaftur til valið í 1990 við teirri grundgeving, at tað bar ikki til bæði at sita sum borgarstjóri í Havn og vera løgtingsmaður samstundis.

**Valevnini hjá Fólkaflokkinum eru:**

Óli Breckmann, løgtingsmaður
Eli Christiansen, umsitingarleiðari
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður
Elsa í Garði, vakurleikaserfrøðingur
Karlot Hergeirsson, skipsførari
Sólja Fríða Jóanisdóttir, skrivstovunæmingur
Leila á Lofti, fysioterapeutur
Poul Michelsen, stjóri
Bjarti Mohr, býráðslimur
Annika Olsen, handilsskúlalærari
Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur

## Nú ber til at læra til alara og fiskavirkara

**Fiskavirki og smolt- og alistøðir kunnu nú taka lærlingar í læru, sum eftir trý ára lærutíð kunnu kalla seg "yrkislærdar fiskavirkarar" ella "yrkislærdar alarar"**

ÚTBÚGVING
*Eirikur Lindenskov*



*Nú ber til at fara í læru sum fiskavirkari ella alari*

*Savnsmynd*

Lærutíðin gevur lærubræv, er tilsamans trý ár, og útbúgvingin hevur tvær sergreinir. Onnur sergreinin, »aling«, er á smoltstøðum og alistøðum og hin sergreinin, »fiskavirking«, fevnir um yrkisøkini: fiskavirki, góðskingarvirki og kryvjivirki.

Í sergreinini »aling« verður dentur lagdur á neyðuga vitan um tey ymsu fiskasløgini, og hvussu alifiskur fæst at trívast, innlit í fóðring, vitan um sjúkur og sjúkufyribyrging, stýringsskipanir innan aling og framleiðslugongdina frá rogni til tøkufisk. Í sergreinini »fiskavirking« verður dentur lagdur á rávøru og rávørustýring, ymiska virking av fiski, merking og goymslustýring, reinhald og reinføri, stýringsskipanir og tøknina á fiskavirkjum.

Eisini verður ásett, at fyrsta skúlaskeiðið er 40 samanhangandi vikur (støðisútbúging á yrkisskúla), og at upplæringin á lærureplássinum skal byrja 12-24 vikur áðrenn fyrsta skúlaskeiðið.

Hetta merkir, at fiskavirkir og smolt-/alistøðir, sum ætla at taka lærling í læru í ár, skulu gera lærusáttmála við lærling í seinasta lagi um miðjan mai mánað.

## Lóg um Vinnuframagrunnin

TÍÐINDASKRIV
*Vinnumálastýrið*

1. januar 2001 kom løgtingslóg um Vinnuframagrunn í gildi. Sambært lógini um Vinnuframagrunnin, skal landsstýrismaðurin í vinnumálum á hvørjum ári boða frá, hvørji vinnugreinaøki dentur skal leggjast á.

Tey vinnugreinaøki sum landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, sambært vinnupolitikkinum ynskir, at serligur dentur skal leggjast á í 2002 eru:

- Teldutøkni
- Biotøkni
- Ferðavinna
- Kreativar vinnur - herímillum tónleik og ítrótt

Nevndu vinnugreinaøki - umframt onnur vinnugreinaøki - verða stuðlað eftir niðanfyrinevndu stuðulsskipanum, sum fevna um:

- vørumenning,
- menning av nýggjum framleiðslutólum og framleiðsluhættum v.m.,
- vørumessur,
- tilevning av sølutilfari, søluroyndir, sølufremj andi tiltøk og marknaðar kanningar,
- granskingar- og kanningarætlanir,
- patentumsóknir.

Umframt onnur vinnuframaátøk og heildarverkætlanir, jvb. § 12, stk. 2 í kunngerðini, ynskir Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, at farið verður undir átak fyri:

- at fáa kvinnur í vinnu (kvinnur sum íbirtarar, er farið í gongd), og
- at kt-klekingardepilin heldur fram

Tey, sum ætla at søkja um stuðul úr Vinnuframagrunninum, skulu venda sær til Vinnuframagrunnin, postboks 3079, 110 Tórshavn.

## Skeið um demenssjúku

SKEIÐ
*Alzheimerfelagið*

Hvussu eru vit saman við teimum dementu?
Minnið, hvat er tað?
Sorg.
Ótti.
Samvitska.

Hesi eru nøkur av evnunum, sum verða viðgjørd á skeiði í MBF-húsinum mánadagin tann 11.mars kl. 9-16. Tað er Elsa Zachariasen, sum stendur fyri skeiðinum. Elsa er útbúgvin sjúkrasystir, hon er demensráðgevi og arbeiðir sum deildarleiðari á einari demensdeild í Brøndby. Hon hevur drúgvar royndir sum undirvísari og fyrilestrarhaldari um demens.

Í mesta lagi 20 fólk sleppa við á skeiðið.

Tilmelding á tlf. 313102 ella t-post: sigmo@post.olivant.fo

## Valstríð á internetinum

**Sosialurin hevur gjørt eina serliga heimasíðu, har øll, sum taka lut í valstríðnum, hava høvi at kjakast**

LØGTINGSVALIÐ
*Eirikur Lindenskov*

Sum atlíð upp undir val, verður sera nógv valtilfar sent bløðunum. Seinastu valini hava víst, at hetta tilfar er altsamt vaksandi. Fyri at lætta eitt sindur um trýstið – og fyri at geva valevnum ein eyka møguleika at sleppa til orðanna, hevur Sosialurin gjørt eina serliga síðu í InternetSosialinum, sum er ætlað valevnum og øðrum, sum taka lut í valstríðnum.

Alt valtilfarið, sum er í blaðnum, verður lagt á hesa síðu, sum er ókeypis at lesa. Síðuna finna vit á forsíðuni á InternetSosialinum, www.sosialurin.fo

Ætlanin við hesi heimasíðu er eisini, at hon skal vera aktiv alt samdøgrið og allar dagar í vikuni, soleiðis at skilja, at tilfar verður lagt út á síðuna við jøvnum millumbilum. Ynskja valevni at svara onkrum, sum t. d. stendur í blaðnum, so kann hetta gerast á heimasíðuni áðrenn blaðið fer til prentingar, og harvið ber til at hava kjak politiskt kjak eisini í vikuskiftinum.

Á síðuni hava flokkarnir hvør sína síðu, har teirra valgreinir verða lagdar. Ein síða er, har nýggjastu greinirnar síggjast og hvørt valevni hevur eisini sína síðu, har allar valgreinirnar hjá viðkomandi eru at síggja.

Tá allir valevnislistarnir eru lidnir, verða teir eisini lagdir inn á síðuna og upplýsingar um øll valevnini.




*Í InternetSosialinum ber nú til – ókeypis – at lesa politiskt kjak, sum verður lagt út á internetið so hvørt*



## Lán við rentulofti

**Føroya Sparikassi er farin undir at bjóða sínum viðskiftafólki lán við sokallaðum rentulofti. Fyri eitt ávíst gjald fáa viðskiftafólk ásett eitt rentuloft tey næstu sjey árini, men fáa samstundis ágóðan av einari møguligari lárentu**

LÁNTØKA
*Heri á Rógvi*



*Hesir báðir bjóða nú eisini trygging.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nú verður møguligt at taka lán við rentulofti í sjey ár fram. Vanliga tá fólk taka eitt lán verður kann rentan vera skiftandi – bæði upp og niður. Hetta eru lán við sokallaðari variablari rentu. Har tað er talan um eina rentu, sum skiftir alt eftir rentu- og fíggjarstøðu. Í løtuni er rentan á útlánum í Føroyum søguliga lá. Vit skulu heilt aftur til fimmtiárini fyri at finna eitt líknandi lágt rentustøði. Í búskaparliga óveðrið kann rentan fara nógv upp, men hon kann sjálvandi eisini fara munandi nógv niður. Føroya Sparikassi bjóðar nú sínum viðskiftafólki ein lánimøguleika, har álagt verður eitt rentuloft, soleiðis at rentan ikki kann fara upp um eitt ávíst og harvið sparir tí einstaka lánstakaranum fyri óvæntaðum meirútreiðslum.

### Trygging

Boðini úr Føroya Sparikassa ljóða, at hetta er ein trygging fyri kundarnar, ið velja at taka eitt lán. Lánini eru serliga ætlaði sum 1. veðrættar lán, tá hetta minkar um risikoina hjá peningastovninum.

– Kundarnir kunnu við hesum tryggja seg ímóti óvæntaðum rentuútreiðsl um, og teir fáa samstundis ágóðan av einum lágum rentustøði, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa.

Eins og við øðrum tryggingum, so kostar henda trygging eisini. Í løtuni er kostnaðurin 3,5% av restskuldini á láninum, ið tryggjað verður. Hetta gjald kann annaðhvørt leggjast omaná lánið ella gjaldast kontant.

Sum dømi kann nevnast, at rentan í dag lliggur um fimm prosent. Um tú lænir 700.000 kostar hetta tær 3.408 kr. um mánaðin eftir rentustuðulin er latin, fyrsta árið. Fer rentan upp, so vil tað sjálvsagt kosta meira at gjalda hetta aftur, og har er heldur einki rentuloft.

Við einum rentuloft verður lánið til 724.000. Rentan verður somuleiðis fimm prosent, og tað fyrsta árið verður útgjaldið 120 kr. meira ella 3.528 kr. um mánaðin eftir rentustuðul. Renuloftið verður lagt við sjey prosent, t.e. rentan á rentuloftaláninum kann ikki fara uppum sjey prosent. Hetta er galdandi í sjey ár fram.

– Rentuloftið kann teknast av øllum, men er fyrst og fremst ætlað teimu, ið hava sethúsalán við langari afturgjaldstíð. Á slíkum lánum er gjaldið viðbrekið fyri størri rentubroytingum, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

## Einki rúsevni í sleikisneisini



*Fyrst var tað ein sleikisneis. Síðani varð tað til rúsevni. Nú er tað so endaliga staðfest, at henda sleikisneisin er einki annað enn sleikisneis.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sleikisneisin, sum skuldi innihalda rúevni, var, tá avtornaði, bert ein púra vanlig sleikisneis**

SLEIKISNEIS
*Heri á Rógvi*

Tað vakti nógvan ans, tá fjølmiðlarnir fyrst í februar mánað boðaðu frá, at ein sleikisneis var endað hjá løgregluni. Henda góða sleikisneis innihelt møguligt rúsandi evni. Sleikisneisin var fingin frá einari ungari gentu, sum hevði hórað ilt, tá fólk byrjaðu at kenna seg heilt øðrvísi, eftir at tey høvdu etið eini sleikisneis, ið onkur hevði deilt út til fólk í Klubbagarðinum í Havn.

Løgreglan sendi sleikisneisina til Danmarkar fyri at verða kannað. Áðrenn hon varð send til Danmark hevði løgreglan í Havn sjálv gjørt nakrar kanningar, og hesar vístu ein feril av amfetamin í sleikisneisini. Sagt varð tá, at hetta skuldi takast við fyrivarnir, tí evni, eitt nú litevni, eru í einari tílíkari sleikisneis, og hetta kundi lættliga ávirkað mátingarnar.

Nú er úrslitið av kanningunum komið aftur, og úrslitið vísir, at ein sleikisneisin ikki var annað enn ein púra vanlig sleikisneis. Har var einki rúsevni í.

Løgreglan í Havn hevur tosað við persónin, ið deildi sleikisneisir út, og hann hevur fingið at vita, at hetta ikki er so heppið, men hann hevur kortini ikki gjørt nakað ólógligt.

Rókur Tummasarson um Menas:

## Ótíðarhóskandi

**– Menas-frágreiðingin ber í stórum mun brá av, at hon er skrivað, áðrenn boringarnar fóru ígongd í føroyskum øki. Har eru fleiri áhugaverd ting nevnd, men samstundis eru eisini nógvir faktuellir feilir, sigur Rókur Tummasarson, fulltrúi í umhvørvismálum**

MENAS-FRÁGREIÐINGIN
*Heri á Rógvi*

Menas-frágreiðingin viðger eisini umhvørvi í sambandi við eina komandi oljuvinnu. Vit hava biðið Rók Tummasarson, fulltrúa í umhvørvismálum á Olju- og Umhvørvismálastýrinum, um at lisið partin um umhvørvi og gjørt viðmerkingar.

Fyrsta viðmerking hansara er, at umhvørvisparturin av frágreiðingin ber ógvuliga nógv brá av, at frágreiðingin er skrivað áðrenn oljuboringarnar fóru ígongd.

– Okkurt vil eg so avgjørt geva teimum rætt í, men sum heild er frágreiðingin ógvuliga nógv ávirkað av, at hon er skrivað, áðrenn boringarnar fóru ígongd. Av hesari orsøk eru flestu tilmælini óneyðug og ótíðarhóskandi, sigur Rókur Tummasarson.

*–Okkurt vil eg so avgjørt geva teimum rætt í, men sum heild er frágreiðingin ógvuliga nógv ávirkað av, at hon er skrivað, áðrenn boringarnar fóru ígongd. Av hesari orsøk eru flestu tilmælini óneyðug og ótíðarhóskandi, sigur Rókur Tummasarson um Menas-frágreiðingina*



Hann heldur, at føroyskir myndugleikar so dyggiliga hava prógvað, at teir kunnu taka sær av oljuvinnuni. Hann nevnir, at higartil hava eingir trupulleikar verið av oljuvinnuni í umsitingini, og øll tey loyvi, ið skulu latast, hava verið latin uttan stórvegis hóvasták av føroyskum myndugleikum.

– Har eru harafturat fleiri faktuellir feilir. Eitt nú tá tosað verður, hvørjar heimildir og uppgávur oljumálastýrið hevur, sigur Rókur Tummasarson.

### Sæð áður

– Nógv av tí, ið verður nevnt í frágreiðingini, verður eisini tikið upp og lagt uppfyri í umhvørvisfrágreiðingini, ið Oljumálastýrið saman við øðrum hevur latið úr hondum, sigur Rókur Tummasarson.

Endamálið við Menas-frágreiðingini verður sagt at vera at eggja til kjak, men Rókur Tummasarson heldur ikki, at nakað kjak fer at spyrjast burturúr hesum partinum.

– Tað er í veruleikanum ikki so nógv at kjakast um. Var hetta komið, áðrenn nógva virksemið fór ígongd, so var her okkurt at kjakast um, men sum nú, er ikki nógv at kjakast um, sigur altso Rókur Tummasarson.

### Riggar væl

Ein kritikkur, sum hevur verið reistur móti føroysku myndugleikunum, er, at umhvørvi og olja hoyra undir sama stýrið. Hetta er nógvastaðni í heiminum púra óhoyrt, men hesum er Rókur Tummasarson als ikki samdur við.

– Tað er ikki nakar trupulleiki við verandi skipan. Umhvørvi verður høgt prioriterað, og tað hevur heldur ikki áður verið hægri prioriterað, sigur Rókur Tummasarson.

Hann vísir m.a. á, at hann er tann fyrsti fulltrúin, ið nakrantíð er settur bert at taka sær av umhvørvismálum.

– Tað er líkamikið, hvørt sýrið umhvørvi hoyrir undir. Eitthvørt málsøki verður høgt prioriterað. Í síðsta enda mugu vit bara hava álit á stýrunum og embætisfólkunum, sigur Rókur Tummasarson.